SOSIALURIN er har tað hendir

-ver við frá byrjan!

HALD SOSIALIN WWW.SOSIALURIN.FO

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 320,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 490,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.


# Sendikaðalin fíggjaður



Stuðulstiltakið við Teimum á Kamarinum í Føroyahúsinum í Keypmannahavn eydnaðist til fulnar, og arbeiðið uppá sendikaðal til Nærvarp Okkara er longu byrjað.

Tá seinasti gesturin fór út gjøgnum portrið á Vesterbrogade 17 sunnumorgunin, kundi troytta men glaða nærvarpsfólkið ásanna, at dreymurin um at sleppa at senda úr egnum sendihøli skjótt fór at gerast veruleiki. Fíggjarliga gjørdist hetta vikuskiftið eitt tað mest væleydnaða nakrantíð hjá Nærvarpi Okkara.

**Fult hús**

Tiltakið var sera væleydnað úr enda í annan. Tey av Kamarinum høvdu lokkað óvanliga nógv fólk inn í Føroyahúsið hesi bæði kvøldini, og úrslitið av hesum var sjálvandi best hugsandi fyri bæði dansibólk, áhoyrarar og Nærvarp Okkara. Fríggjakvøldið var heilt nógv fólk, og leygarkvøldið var útselt. Sjálvt um miðalaldurin á áhoyrarunum var hægri enn til nógv onnur tiltøk í Føroyahúsinum vóru ung sum eldri farin í dans við Føroya elsta dansibólki.

**Skuffaðu ikki**

Tey av Kamarinum skuffaðu heldur ikki, ein av teimum eldru áhoyrarunum segði at tað svingaða eins væl og í gomlum døgum. Dansigólvið var fult frá fyrsta lagið til seinasta, og í fleiri av steðgunum gekk felagssangurin væl. Tað góða lagið merkti alt vikuskiftið, eisini tá tónleikabólkurin og nærvarpsfólkið um morgunin troytt ásannaðu at kaðalin var fíggjaður og tað dyggiliga.

**Kaðalarbeiði byrja**

Longu mánadagin fór arbeiðið við at leggja kaðal inn í gongd, og áðrenn mánaðin er úti verður føroyska røddin á fm bandinum í Keypmannahavn at hoyra úr egnum sendihøli.

**Vælvilji frá øllum luttakandi**

Tiltakið hevði ikki eydnast uttan vælvilja frá øllum luttakandi. Nærvarpið ynskir tí at takka øllum sum luttóku; Føroyhúsinum sum legði hús og vælvilja til, Nærvarpsfólki sum sjálvboðið arbeiddi alt vikuskifti, áhoyrarunum sum stuðlaðu tiltakinum fíggjarliga og eina serstaka tøkk til Tey av Kamarinum sum savnaðu áhoyrarnar og góvu øllum eina hugnaliga løtu, og sum endurstovnaðu bólkin fyri á hendan hátt at stuðla Nærvarp Okkara.

# Innbrot og rúsdrekkakoyring

Á middegi sunnudagin fór ein maður í Kommunuskúlagarðin eftir bilinum, sum hann hevði sett frá sær har.

Men tá hann kom til bilin sá hann, at ótangar høvdu verið har undan honum, og teir høvdu tikið frontplátuna av stereoanlegginum í bilinum. Hetta er ein av teimum sum er ætlað at taka av, men tað er ætla eigaramanninum og ikki innbrotstjóvum.

Mánamorgunin um fýratíðina varð ein 20 ára gamal maður tikin í Havnargøtum. Løgreglan hevði hann mistonktan fyri at koyra við kenning, og tí valdu teir at steðga honum og taka blóðroynd av honum.

Um løgreglan hevði rætt ella ikki, fættir ungi bilførarin nærri um seinni.

# Lógarbroytingar kosta landskassanum uml. 7 mió. kr. í ár

*Verður barnaansingarøkið lagt út til kommunurnar at umsita 1. apríl 2000, og verður lógin um býtið av almannaútreiðslum v.m. tikin av 1. apríl 2000, so minkar játtanin á løgtingsfíggjarlógini til barnaansing við uml. 42.689,- mió. kr., og útreiðslurnar á løgtingsfíggjarlógini til almannamál vaksa við uml. 49.786,- mió. kr, vísur Helena Dam á Neystabø á í uppskotinum um býti av almannaútreiðslum*

ÓLAVUR Í BEITI

Uppskot til løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslum v.m. , var lagt fram í farnu viku av Helenu Dam á Neystabø, almanna- og heilsumálaráðharra.

Í viðmerkingunum til uppskotið, sigur almanna- og heilsumálaráðharrin, at í juli mánaði í ár fekk hon handað eitt álit frá einum arbeiðsbólki, sum hon hevði sett at koma við einum tilmæli um eitt greiðari býti millum land og kommunu, og hvussu uppgávu-, fíggjar- og ábyrgdarbýtið skuldi verða frameftir.

– Niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum var, at barnaansingarøkið frá ár 2000 skuldi leggjast út til kommunurnar. Fyri at kompensera kommunurnar fyri tær meirútreiðslur, sum standast av hesum, skuldi løgtingslógin um býtið av almannaútreiðslum takast av, soleiðis at landskassin frameftir skuldi rinda allar tær útreiðslur, sum fyrr vóru, sambært lógini um býtið av almannaútreiðslum v.m. við einum ávísum prosentbýti, býtt millum land og kommunu.

Og um avleiðingina, sigur Helena Dam á Neystabø, at hon fyri ár 2000 verður, um lógin verður sett í gildi 1. apríl: at kommunurnar spara 49.786,- mió. kr. fyri almannamál og fáa eina meirútreiðslu upp á 49.730 mió. kr., og at landið sparir 49.730,- mió. kr. fyri dagstovnaøkið og fær eina meirútreiðslu upp á 49.786,- mió. kr.

**Torført at siga**

– Tað er torført at siga, hvussu tær endaligu fíggjarligu avleiðingarnar koma at síggja út. Á fíggjarlógini fyri ár 2000 eru 59.266,- mió. kr. settar av. Útrokningarnar vísa, at við verandi virksemi við eini lønarhækking uppá 3%, og at landið frá 1. januar 2000 skal rinda 40% av rakstrinum, kostar dagstovnaøkið 66.307,- mió. kr. Tá er ikki íroknað møguligt nýtt virksemi í ár 2000.

– Verður barnaansingarøkið lagt út til kommunurnar at umsita 1. apríl 2000, og verður lógin um býtið av almannaútreiðslum v.m. tikin av 1. apríl 2000, so minkar játtanin á løgtingsfíggjarlógini til barnaansing við uml. 42.689,- mió. kr., og útreiðslurnar á løgtingsfíggjarlógini til almannamál vaksa við uml. 49.786,- mió. kr. Tað merkir, at hesar lógarbroytingar koma at kosta landskassanum uml. 7 mió. kr. í ár 2000.

– Í teimum førum, har ivi stendst um, hvørt ein útreiðsla skal rindast av kommununi ella landinum, tí at lógin um býtið av almannaútreiðslum verður tikin av 1. apríl 2000, sum er mitt í árinum, skal landið rinda útreiðsluna. Hetta kann hava við sær meirútreiðslu fyri landskassan, sigur Helena Dam á Neystabø m.a. í viðmerkingunum til uppskotið.




GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

| | | |
|---|---|---|
| Nissan Sunny | 1.6 SLX, beige, 4 hurðar, AT, árg.1986,153.000 km. | 9.000 |
| Nissan Almera | 2.0d GX, gráur, 4 hurðar, árg. 1997, 106.000 km. | 115.000 |
| Nissan Bluebird | 2.0 SGL, vínreyður, 4 hurðar, árg. 1985, 182.000 km. | 12.000 |
| Nissan Patrol | 3.3 Turbo S/R, reyður, 5 hurð., árg. 1988, 185.000 km. | 48.000 |
| Peugeot | 106 1.4 XR, svartur, 3 hurðar, árg. 1998, 32.000 km. | 88.000 |
| Peugeot | 306 GTi Premium, svartur, 3 h., árg. 1999, 10.000 km. | 210.000 |
| Peugeot | 405 GTXDT 1.9, bláur, 4 h., árg. 1995, 68.000 km. | 105.000 |
| Peugeot | 406 ST 1.9 DT, grønur, 4 h., árg. 1996, 58.000 km. | 138.000 |
| Peugeot | 406 ST 2.1 DT, vínreyður, 4 h., árg. 1997, 108.000 km. | 155.000 |
| Citroën Xantia | TD, vínreyður, 5 hurðar, árg. 1995, 161.000 km. | 120.000 |
| Ford Escort | 1,3, bláur, 3 hurðar, árg. 1987, 145.000 km. | 16.000 |
| Ford Fiesta | Reyður, 3 hurðar, árg. 1991, 120.000 km. | 33.000 |
| Nissan king Cab | 4x4, gráur, 2 hurðar, árg. 1991, 228.000 km. | 60.000 |
| Opel Kadett | 1.3S LS, bláur, 5 hurðar, árg. 1987, 95.000 km. | 17.000 |
| Toyota bussur | Hi Ace DSL, hvítur, 4 hurðar, árg. 1988, 201.000 km. | 28.000 |

Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

Meinhardt Arge
Tjaldursvegur • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

fk


# SKEIÐ Á HÚSARHALDSSKÚLA FØROYA á várið 2000

**VESTASKEIÐ TIL FØROYSKA BÚNAN** (Vikuskiftisskeið)

Lær at seyma vest til føroyska búnan.
Vikuskiftisskeið 17.-18. mars og 24.-25. mars.
Skeiðið byrjar fríggjakvøld kl. 19.00-22.00 og leygardag frá kl. 09.30-16.30.
Undirvísari: Gunhild W. Arge.
Kostnaður fyri skeiði er kr. 600,- íroknað mat.

**BUKSUSKEIÐ TIL FØROYSKA BÚNAN** (Vikuskiftisskeið)

Lær at seyma buksur til føroyska mannfólkabúnan.
Vikuskiftisskeið 28.-29. apríl og 05.-06. mai.
Skeiðið byrjar fríggjakvøld kl. 19.00-22.00 og leygardag frá kl. 09.30-16.30.
Undirvísari: Gunhild W. Arge.
Kostnaður fyri skeiði er kr. 600,- íroknað mat.

**PATCHWORKBINDING/DOMINO** (Vikukeið)

Ein annarleiðis og spennandi bindiháttur. Frálæra verður givin í grundteknikki í patchworkbinding, at hefta endar saman meðan bundi verður, gera ætlan um lutir og pløgg, at gera kantbinding og útrokningar.
Skeiðið er 35 tímar íalt harav 10 tímar í atstøði.
Frá 08. mai til 12. mai. Undirvíst verður frá kl. 09.00-16.00.
Undirvísari: Paulina Eliasen.
Kostnaður fyri skeiðið er kr. 1.000,- íroknað mat.

**BRODERING TIL FØROYSK KLÆÐIR OG ANNAÐ** (Vikuskeið)

Frálæra verður givin í at tekna mynstur til fyriklæð og turriklæð til føroysk klæðir úr føroysku floraðini og í brodering. Møguleiki er eisini at tekna mynstur til ymiskt annað.
Skeiðið er frá 08. mai til 12. mai. Undirvíst verður frá kl. 09.00-16.00.
Undirvísari: Jutta Hansen.
Kostnaður fyri skeiðið er kr. 1.000,- íroknað mat.

**LÆRA AT SEYMA KOT TIL FØROYSKA BÚNAN** (Vikuskeið)

Frálæra verður givin í tilskering og seyming.
Skeiðið er frá 22.-26. mai. Undirvíst verður frá kl. 09.00-16.00.
Undirvísari: Gunhild W. Arge.
Kostnaður fyri skeiðið kr. 1.500,- íroknað mat og gisting.

**HEILSUGÓÐUR MATUR/YMISKT HANDARBEIÐ** (Vikuskeið)

Frálæra verður givin í heilsugóðum mati, føðslulæru og ymiskum handarbeið, so sum silkimáling, seyming, brodering, leðurseyming, føroysk bond o.a. útferð.
Undirvísarar: Jutta Hansen, Gunhild W. Arge, Paulina Eliasen, Jonhild Henriksen og Jóhanna á Tjaldrafløtti.
Skeið er frá 05.-09. juni. Skeiðið er eitt vistarskeið.
Kostnaður kr. 1.500,- íroknað mat og gisting.

*Tilmelding skal verða í seinasta lagi 1 viku áðrenn skeiðið byrjar.*
*Møguleiki er fyri at gista á skúlanum til øll skeiðini.*

*Fleiri upplýsingar um skeiðini fáast við at venda sær til skúlan.*
*Viðmerkjast skal, at tað er avmarkað luttøku til øll skeiðini.*

HSF **Húsarhaldsskúli Føroya**
Stoksoyrarvegur 29 • FO 700 Klaksvík
Tel. 456974 • E-mail: hsf@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820


Vit bjóða breitt úrval av inventar til:

- Goymslur
- Arkiv
- Vørubilar
- Arbeiðsrúm

Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820


# TB Aðalfundur

Lýst verður til aðalfund hjá TB mikudagin 23. februar kl. 20.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Tvøroyrar Bóltfelag**


**Bilar við stórum skaða til sølu**

**Daihatsu Charade CS 1.0 diesel, árg. 1987**
*og ein*
**Merzedes Bens 190 D árg. 1986**

TRYGD
Tel. 214478


# Aðalfundurin

hjá **Arbeiðarafelagnum Lýsing** verður fríggjadagin 25. februar.

Skrá sambært lógum felagsins.

Tíð og stað verða lýst seinni.

**Nevndin**

# Norðstreymoyar Javnaðarfelag

## Almennur fundur

um javnaðarpolitik grundaður á dagsaktuel mál, verður á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna mikukvøldið tann 09. februar kl. 20.30.

Hendrik Old, Kristian Magnussen og Hans Pauli Strøm luttaka.

# Sosialistiskt Ungmannafelag & Unga Sambandið

skipa fyri almennum fundi á Parnassinum á Hotel Hafnia leygardagin 12. feb. kl. 14.00

**Evni:**
**Útbjóðing av almennum ognum**
**Miðsavnan & miðspjaðing**

**Orðstýrari: Ólavur Ellefsen**

Gestir á fundinum verða umboð fyri tingmanning Javnaðarfloksins og Edmund Joensen fyri Sambandsflokkin.

Øll eru vælkomin

Sosialistiskt Ungmannafelag & Unga Sambandið

www.sosialurin.fo